# Álit um grundskeið í kokkayrkinum

YRKIS depilin
januar 2009

**Arbeiðssetningurin:**

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var at:

- Dagføra skipskokkaútbúgvingina við atliti at teimum krøvum, sum sett verða til førleikan til yrkið.
- At lýsa hvussu dagførda skipskokkaútbúgvingin verður skipað við atliti at útbúgvingarlongd og býtið millum verkliga partin og skúlapartin.
- At skipa karmarnar fyri útbúgvingina soleiðis, at avriksflutningur kann gevast til yrkisútbúgvingina til kokk

**Søguliga gongdin í málinum:**

Tann 17. mars 2003 sendi Mentamálaráðið Yrkisútbúgvingarráðnum bræv viðvíkjandi skipskokkaútbúgvingini.

Á Ráðsfundi 26. mars 2003 var áheitanin um at seta í verk skipskokkaútbúgving til viðgerar. Mentamálaráðið hevði heitt á Yrkisútbúgvingarráðið um at seta ein arbeiðsbólk til at koma við einum áliti um skipskokkaútbúgving. Ein 5 mánaðar skipskokkaútbúgving hevur í mong ár verið á Klaksvíkar Sjómansskúla. Sum skilst eru mong, sum taka hesa útbúgving, hóast eingi formlig krøv eru um, at kokkar á skipum skulu hava tikið hesa útbúgving. Skipskokkaútbúgvingin er sum so ikki fata av uppgávum Yrkisútbúgvingarráðsins, men sambært skrivinum frá Mentamálaráðnum ynskir tað, at Yrkisútbúgvingarráðið viðger hesa útbúgving við tí fyri eygað, at hon annaðhvørt kann verða ein sjálvstøðug yrkisútbúgving ella partur av verandi yrkisútbúgving til kokk. Eg mæli til, at Yrkisútbúgvingarráðið tekur á seg hesa uppgávu og setur ein arbeiðsbólk til at geva Mentamálaráðnum eitt álit um hesi viðurskifti.

Ráðið samtykti at taka undir við áheitanini frá Mentamálaráðnum um at seta ein arbeiðsbólk at koma við tilmæli um íverksetan av skipskokkaútbúgving. Avrátt varð, at formaðurin og skrivarin skulu finna út av - út frá skrivinum frá Mentamálaráðnum og umrøðuni av málinum - hvørji skulu manna arbeiðsbólkin.

Í mars 2004 kom tilráðing um yrkisútbúgving, sum skal geva førleika til køksarbeiði og matgerð umborð á skipum og á matstovum. Tilráðingin liggur á Yrkisdepilsins heimasíðu undir http://www.yrkisdepilin.fo/ntk/alrit.htm

Á ráðsfundi 20. oktober 2004 var omanfyri nevnda mál til framhaldandi viðgerð av tilráðing frá fyribilsnevnd um yrkisútbúgving innan køksarbeiði og matgerð.

Eftir áheitan formansins, varð heitt á Niclas Hovgaard, fulltrúa í Vinnu- og miðnámsskúladeildini og limur í fyribilsnevndini, um at greiða frá arbeiðinum og at svara møguligum spurningum frá ráðslimunum.

Ráðið tók ikki undir við tilráðingini frá fyribilsnevndini - samanber eisini gerðabókina í sambandi við 1. og 2. viðgerðina av málinum. Tó ynskti ráðið, at heitt verður á Mentamálaráðið um at siga sína hugsan um nevndu tilráðing. Yrkisútbúgvingarráðið heldur tað verða av týdningi at vita, um Mentamálaráðið er samt um tær víttfevndu broytingarnar, sum fyribilsnevndin mælir til, herundir um Mentamálaráðið tekur undir við, at skipaður verður ein matvøruskúladepil og at skipað verður fyri einum støðisári innan matvøruøkið.

Á ráðsfundi 15. juni 2005 var framhaldandi viðgerð av tilráðing frá fyribilsnevnd um yrkisútbúgving innan køksarbeiði og matgerð. Sambært gerðabókina frá seinasta ráðsfundinum varð samtykt at heita á Mentamálaráðið um at siga sína hugsan um nevndu tilráðing. Í svarskrivinum frá landsstýrismanninum/Mentamálaráðnum verður m.a. sagt, at tilráðingin er áhugaverd, men heitir samstundis á Yrkisútbúgvingarráðið um at seta ein arbeiðsbólk til at dagføra verandi kunngerð um skipskokkaútbúgvingina, soleiðis at næmingarnir kunnu fáa avriksflutning til kokkaútbúgvingina

Ráðið tók frágreiðingina hjá landstýrismanninum/Mentamálaráðnum til eftirtektar, men helt at tilráðingin frá fyribilsnevndini um yrkisútbúgving innan køksarbeiði og matgerð fyribils ikki skuldi viðgerast nágreiniligari. Eftir tilráðing frá landsstýrismanninum/Mentamálaráðnum samtykti ráðið, at Yrkisdepilin setir ein arbeiðsbólk til at dagføra kunngerðina um skipskokkaútbúgvingina, soleiðis at næmingar frá tí útbúgvingini kunnu fáa avriksflutning til kokkaútbúgvingina á landi.

Arbeiðsbólkurin fer til verka og heldur 7 fundir frá 24. november 2005 til 5. apríl 2006. Tann 8. komandi fundurin, sum varð avtalaður at vera í Yrkiskdeplinum 24. apríl k 13.30, bleiv ikki, tí at her steðgaði arbeiði í arbeiðsbókinum upp.

**Arbeiðsgongd síðani málið bleiv tikið uppaftur:**

Upplýst var av ráðskrivaranum á ráðsfundi 6. juni 2007, at hann vildi taka arbeiði uppaftur eftir summarfrítiðina. Tann 30. august 2007 var sami arbeiðsbólkur, sum settur var at arbeiða við málinum 24. november 2005, boðin til fundar.

Í arbeiðsbólkinum eru:
Jóhan Jákup Vørmadal, Vinnuhúsið.
Erling Joensen, Føroya Fiskimannafelag.
Gudna á Rógvu Joensen, serkøn vald av Yrkisdeplinum.
Edvard Olsen, Sjómansskúlin í Klaksvík.
Niclas Hovgaard, Mentamálaráðið.
Eyðun Gaard, Yrkisdepilin.

**Nýggj kunngerð:**

Arbeiðsbólkurin er komin fram til eina kunngerð um grundskeið í kokkayrkinum. Longdin á skeiðnum er 20 vikur. Skeiðið hevur onga verkliga læru.

Innihaldið í skeiðnum tekur støðið í tí danska grundførløbet – Mad til mennesker, og hava vit lagt lærugreinarnar í kunngerðini soleiðis til rættis, at tað beinleiðis gevur avriksflutning til tað donsku útbúgvingina – Mad til mennesker.

Orsøkin til, at hetta er gjørt á henda hátt er, at næmingar hava møguleika at fara víðari til fulla yrkisútbúgving við at gera ein føroyskan lærusáttmála, taka fyrsta skúlaskeið í Føroyum og restina av skúlagongdini í Danmark. Sostatt hevur Yrkisdepilin ábyrgdina av, at útbúgvingin fer fram á rættan hátt eftir teimum forskriftum og avtalum, sum eru galdandi ímillum Mentamálaráðið og Undervisningsministeriet í Danmark.

Fyri at skeiðið skal vera førleikagevandi til fulla yrkisútbúgving í Føroyum, skal tað fyrst góðkennast sum eitt yrkisskeið av Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndini fyri yrkisskeið, tá tað er gjørt, blívur tað ein náttúrligur partur av yrkisútbúgvingunum.

**Niðurstøða:**

Arbeiðsbólkurin metir seg tí, at hava rokkið málinum um tillaging av kunngerðini av skipskokkaútbúgvingini, soleiðis at hon gevur ein ávísan støðisførleika í matvøruyrkinum

bæði á sjógvi og á landi, og kann geva avriksflutning til eina yrkisútbúgving innan matvøruyrkið.

Tórshavn tann 13. januar 2009

| | | |
|---|---|---|
| Jóhan Jákup Vørmadal | Erling Joensen | Gudna á Rógvu Joensen |
| Edvard Olsen | Niclas Hovgaard | Eyðun Gaard |

# Kunngerð nr. xxx frá xx. februar 2009 um grundskeið í kokkayrkinum


- Kapittul 1 Endamál
- Kapittul 2 Skipan av skeiðnum
- Kapittul 3 Atgongd
- Kapittul 4 Útbúgvingarbók
- Kapittul 5 Avriksflutningur
- Kapittul 6 Næmingaskyldur og rættindi
- Kapittul 7 Undirvísingarførleiki
- Kapittul 8 Próvtøka
- Kapittul 9 Kærur
- Kapittul 10 Góðkenning og dygdarmenningarskipan
- Kapittul 11 Gildiskoma


Við heimild i § 2 stk. 1 punkt 10, § 4, § 6, § 7 stk. 1 og § 11 í Løgtingslóg nr. 55 frá 24.04.2001 og Løgtingslóg nr. 22 frá 17. mai 2004 um yrkisskeið.

**Kapittul 1**
**Endamál**

**§ 1.** Endamálið við grundskeiðnum í kokkayrkinum er:

1) at geva næmingunum møguleika at nema sær útbúgvingarførleikar sum grundarlag fyri víðari útbúgving innan matvøruyrkið
2) At arbeiða sum hjálpari hjá yrkislærdum innan matvøruyrkið
3) At arbeiða sum kokkur á føroyskum skipum

Stk 2. Næmingurin skal hava hesar førleikar fyri at sleppa til víðari útbúgving innan matvøruyrkið

1) við vegleiðing meta um og tilvirka vanligar rávørur til mat
2) við vegleiðing kunna arbeiða í toymum og loysa fakligar og handligar arbeiðsuppgávur í samband við handfaring av mati.

**§ 2.** Grundskeiðið er eitt skúlaskeið á 20 vikur

## Kapittul 2
## Skipan av skeiðnum

**§ 3.** Skúlin skal gera eina námsætlan, sum Mentamálaráðið skal góðkenna og hevur eftirlit við.
*Stk. 2*. Námsætlanin skal m.a. lýsa innihald í lærugreinunum, undirvísingarhættir, undirvísingar-tilfar og próvtøku.
*Stk. 3.* Frálærutíðin er 20 vikur á 36 pultstímar og eftir lokið skeið skal næmingurin hava nomið sær frálæru í hesum lærugreinum:

1) Fyrstuhjálp og grundleggjandi eldsløkking, 0,5 vika.
2) Reinføri, 1 vika.
3) Kunningartøkni, 1 vika.
4) Umhvørvi, 1 vika.
5) Matvøruevnafrøði F
6) Samskifti føroyskt F
7) Heilsa og náttúrufak F

*Stk. 4*. Tær í stk. 3. nr. 1 og 2, nevndu lærugreinir skulu vera staðin.
*Stk. 5.* Næmingurin skal umframt teir í § 1 stk. 2. nevndu førleikar eisini hava hesar førleikar fyri at sleppa til eina víðari útbúgving innan matvøruyrkið

1) Við vegleiðing at kunna um matvørur og tæna kundanum/gestunum i ymiskum tænastu- og sølu viðurskiftum

2) At hava nomið sær vitan um matvørur, heilsu og náttúrufakligar eginleikar og týdningin av hesum fyri tann einstakað, virkið og samfelagið i sambandi við einfalda matvørutilvirkan og matvøruframleiðslu. Hetta førleikamál hevur eitt støði svarandi til grundfakini heilsu og náttúru á støði F

3) At nýta rætt rávørutilfar, arbeiðshættir, amboð og útgerð i mun til einfaldar og vællýstar arbeiðsuppgávur

4) At málbera seg munnliga og skrivliga á føroyskum í arbeiðs- og útbúgvingarligum samanhangi. Hetta førleikamál hevur eitt støði svarandi til lærugreinuna føroyskt á F stigi

5) Við vegleiðing at nýta grundleggjandi matgerðarhættir og framleiðsluhættir og vera førur fyri at vísa sjálvstøðugt innaneftirlit við atlitið at serligum krøvum

6) Við vegleiðing framleiða máltíðir, veita gesta/kunda tænastu í mun til føroyskar og altjóða siðir og útvikling.

7) Við vegleiðing keypa inn, bíleggja og móttaka vørur, leggja fíggjarætlan og prísáseting við atliti at grundleggjandi reglum um marknaðarføring.

8) Við vegleiðing fyrireika og veita kundatænastu í sambandi við einfaldar borðreiðingarhættir á matstovum,

9) Við vegleiðing borðreiða til verður, borðreiða til sjálvtøku og kundatænastu innan kafeteriu- og kantinuøkið

10) Við vegleiðing tilvirka rávørur, samanseta og matgera einfaldar úrdráttir, rættir og matskráir

**Kapittul 3**
**Atgongd**

**§ 4.** Atgongd til grundskeið í kokkayrkinum hevur umsøkjari, sum hevur fylgt undirvísingini til fráfaringarroynd fólkaskúlans.
*Stk. 2.* Skúlastjórin kann víkja frá ásetingunum í stk. 1, um umsøkjari lýkur aðrar fortreytir enn tær, sum eru nevndar í stk. 1, og mett verður, at hann er førur fyri at taka skeiðið til ásettu tíðina.

**Kapittul 4**
**Útbúgvingarbók**

**§ 5.** Við skeiðsbyrjan fær næmingurin útflýggja eina útbúgvingarbók frá skúlanum. Ùtbúgvingarbókin skal fevna um:

1. Skúlin váttar fyri frálæru og aðrar ásetingar um útbúgvingina, sum næmingurin hevur verið ígjøgnum.
2. Váttan frá læruplássi fyri starvsvenjing.
3. Útbúgvingarætlan fyri næmingin
4. Onnur viðurskifti sum hava týdning fyri útbúgvingina smb. stk. 2-4.

*Stk. 2.* Skúlin hevur ábyrgdina av, at í útbúgvingarbókini eru ásetingar um skeiðið, umframt ásetingar um førleikakrøv fyri starvsvenjing á skúla .
*Stk. 3.* Næmingur, ið hevur góðkendan lærusáttmála, setur avrit av hesum, saman við møguligum ískoytum, inn í útbúgvingarbókina. Harumframt setur næmigurin inn avrit í útbúgvingarbókina, av prógvum og øðrum váttanum fyri grundskeið/støðisútbúgving, og ásetingar frá skúlanum og starvsvenjing, sum næmingurin hevur staðið/gjøgnumført. Næmingurin avgerð um prógv fyri frálæru, sum ikki er kravd í yrkisútbúgvingini, skal setast inn í útbúgvingarbókina. Hesi skjøl kunnu setast inn í staðin fyri viðkomandi partar av námsætlanini, so hvørt sum útbúgvingin verður gjøgnumførd.
*Stk. 4.* Næmingurin kann innføra møguligar upplýsingar og váttan fyri starvsvenjing frá øðrum landi.
*Stk. 5.* Útbúgvingarbókin er persónlig. Næmigurin hevur ábyrgd av at útskrivaði prógv og møguligar broytingar í námsætlanini verða førdar í útbúgvingarbókina. Skúlin hevur ábyrgd av at eftirkanna innføringarnar og vegleiða næmingin. Næmingurin skal kunna læruplássið um innihaldið í útbúgvingarbókini.
*Stk. 6.* Útbúgvingarbókin, og onnur prógv sum hoyra til útbúgvingarbókina, skulu ikki geva upplýsingar um fráveru, sosial viðurskifti ella aðrar viðkvæmar upplýsingar um næmingin.
*Stk. 7.* Útbúgvingarbókin kann heilt ella lutvíst verða til skjals talgild.

**Kapittul 5**
**Avriksflutningur**

**§ 6.** Skúlin kann eftir umsókn góðkenna, at lærugreinir, sum tann lesandi hevur staðið, verða flutt fyri javnmett avrik í skeiðnum.
*Stk. 2.* Avriksflutningur verður góðskrivaður eftir umsókn til skúlan og er treytaður av:

1) at kravdu førleikarnir eru skjalprógvaðir, og
2) at umsøkjarin í minsta lagi hevur fingið próvtalið 6 ella "staðið" á sama ella hægri stigi í mun til grundskeið í kokkayrkinum, sum avriksflutningur verður søktur um.

**§ 7.** Lesandi, sum fáa partar av skeiðnum fluttar sum avrik, hava ikki skyldu til at luttaka í undirvísing ella próvtøku í flutta avrikinum.
*Stk. 2.* Avrik, sum eru flutt, verða skrásett sum staðin/góðkend.
*Stk. 3* Avgerðir um avriksflutning skulu góðkennast av Mentamálaráðnum.

## Kapittul 6
## Næmingaskyldur og rættindi

**§ 8.** Skúlin skal kunna næmingar um tær reglur, sum eru galdandi í skúlanum.
*Stk. 2.* Næmingar hava skyldu at fylgja ásettum reglum um lestrarvirkni í skeiðnum.
*Stk. 3*. Næmingur, sum fremur grovt brot á reglur skúlans, kann verða vístur burtur úr skúlanum.

## Kapittul 7
## Undirvísingarførleiki

**§ 9.** Lærari, sum undirvísir skeiðsluttakarum eftir hesi kunngerð, skal í minsta lagi:
*Stk. 1.* Í verkligum yrkislærugreinum, hava grundútbúgving sum yrkislærdur innan viðkomandi fakøki, og í minsta lagi 5 ára viðkomandi og tíðarhóskandi vinnulívsroyndir, ella hava hægri viðkomandi útbúgving.
*Stk. 2.* Í almennu lærugreinunum, lúka tey førleikakrøv, ið alment eru galdandi fyri tey stig sum lærugreinin er á.

**§ 10.** Lærari, ið verður settur í fast starv, skal umframt ásetingarnar í §§ 9 og 10, hava tikið námsfrøðiliga útbúgving, sum Mentamálaráðið hevur góðkent.

## Kapittul 8
## Próvtøka

**§ 11**. Skipað verður fyri próvtøkum sambært námsætlanini.
*Stk. 2.* Próvtøkur, royndarhættir, próvdøming, próvskjøl og kærur um próvtøku fylgja ásetingunum, í lýstar eru í ***felags próvtøkukunngerð*** fyri miðnámsútbúgvingar.

**§ 12.** Skeiðið endar við einari verkætlan, sum liggur til grund fyri einari roynd, har mett verður um førleikarnar hjá næminginum við atliti at teimum málum, sum sett eru fyri skeiðið smb. § 3 stk. 5.
*Stk. 2.* Royndin fylgir ásetingunum smb. § 11 stk. 2
*Stk. 3.* Vanliga heldur royndin á í 30 min. íroknað próvtalsmeting.

*Stk. 4.* Nærri ásetingar fyri verkætlan og roynd verða lýstar í námsætlanini.

## Kapittul 9
## Kærur

**§ 13.** Avgerðir, sum skúlin tekur sambært hesi kunngerð, kunnu verða kærdar til Mentamálaráðið.
*Stk. 2.* Kærur sbrt. stk. 1 verða latnar skúlastjóranum, sum ger eitt ummæli, sum kærarin skal hava høvi at gera viðmerkingar til innan eina viku. Skúlastjórin sendir kæruna, ummælið og møguligar viðmerkingar hjá kæraranum til Mentamálaráðið.
*Stk. 3.* Freistin at kæra eftir stk. 1 er 2 vikur frá tí degi, avgerðin er fráboðað kæraranum.

## Kapittul 10
## Góðkenning og dygdarmenningarskipan

**§ 14.** Mentamálaráðið góðkennir útbúgvingarstovnar, sum veitara av grundskeiði í kokkayrkinum
*Stk. 2.* Skipan, eftirlit og eftirmeting av undirvísingini verður framt í samsvari við ásetingar frá landsstýrismanninum um dygdarmenning og skjalprógvan av skeiðnum.

## Kapittul 11
## Gildiskoma

**§ 15.** Lærari, sum er í føstum starvi og ikki lýkur krøvini í § 9, skal fyri at halda fram at undirvísa, í seinasta lagi 3 ár eftir at henda kunngerð er komin í gildi, vera á einum førleikastøðið, sum er í samsvari við ásettu krøvini í § 9 og § 11.
*Stk. 2.* Skúlastjórin og lærarin avtala í felag, hvussu lærari kann dagføra sína útbúgving. Mentamálaráðið skal góðkenna avtaluna.

**§ 16.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fara úr gildi kunngerð nr. 132 frá 14. september 1992 um grundskeið í skipskokkayrkinum. Kunngerð nr. 91 frá 6. juli 1988 um skipskokkaroynd, sum broytt við kunngerð nr. 93 frá 11. juli 1988.

Mentamálaráðið xx. februar 200x
**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýrismaður
/Leivur Harryson (sign.)